**Eldraráðið í Tórshavnar kommunu**
**Tórsgøta 21, 100 Tórshavn**
**eldrarad@torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Eldraráðið 2021 – 2024

| | |
|---|---|
| Fundur: | Nr. 5 |
| Tíð: | 08-04-21 kl. 13.00 |
| Stað: | Tilhaldið í Tórsgøtu |

**Møtt:** Bjørghild Djurhuus, næstforkvinna, Julianna Klett, kassameistari, Marin Rasmussen, limur, Petur Rouch, skrivari, ogg Ingigerð á Trøðni, fyrstvaldi varalimur.

Tað lá ikki fyri hjá Katrin Holm at møta.

**Fundarskrá:**

1. Góðkenna fundarfrágreiðing frá seinasta fundi
2. Umrøða av ógegnismáli
3. Fyrireiking av tiltøkum hjá Eldraráðnum í heyst
4. Ymist

AD 1 Góðkenna fundarfrágreiðing frá seinasta fundi

Fundarfrágreiðing #4 var góðkend.

AD 2 Umrøða av ógegnismáli

Eldraráðið er vorðið kunnað um, at varalimurin Ingrid Henriksen hevur kært Bjørghild Djurhuus fyri kommunala eftirlitinum í samband við, at Bjørghild Djurhuus luttók í málinum 17.12.2020, tá Tórshavnar Býráð avgjørdi at taka undir við viðtøkubroytingunum hjá Eldraráðnum.

Tað var eitt samt Eldraráð, sum bað Tórshavnar Býráð um at broyta viðtøkurnar. Tá var Bjørghild Djurhuus ikki limur í Eldraráðnum. Bjørghild Djurhuus hevði, sum Kommunala Eftirlitið eisini hevur staðfest, ongar gegnistrupulleikar.

Eldraráðið átalar harðliga framferðina hjá varalimi, Ingrid Henriksen, sum ikki er til gagns fyri samstarvið við Eldraráðið.

AD 3 Fyrireiking av tiltøkum hjá Eldraráðnum í heyst

Nú Eldraráðið hevur fingið loyvi at halda tiltøk í Tilhaldinum hóskvøld, varð tosað um at lýsa við teimum ætlanum Eldraráðið hevði við hesum kvøldsetum. Orðast skal ein fráboðan, sum skal leggjast út á heimasíðuna hjá Tórshavnar Kommunu, og sum eisini skal síggjast á Facebook.

Evnini vera fjølbroytt og bæði til gamans og álvara.

Hesi evni vóru nevnd:
- Havnin fyrr
- Arvarættur
- Hvat krevst í dag fyri at taka eitt koyrikort
- Trygd á netinum
- Tá makin fellur frá
- Hugnakvøld við harmoniku og sangi og eldri tónleiki
- Lakkplátur í Føroyum
- Bústaðarviðurskifti

Evnini eru mong og óivað koma mong nýggj og góð hugskot, tá lýst verður við hesum á heimasíðuni og á facebook.

<u>AD 4 Ymiskt</u>

Í næstum verður fundur við borgarstjóran og Eldranevndina í Tórhavnar kommunu, ið - sum avtalað er frammanundan - skal vera hvønn ársfjórðing. Her fer Eldraráðið at fregnast um, hvussu tað gongst við hjartamálunum hjá Eldraráðnum.

Í hesum sambandi vóru onnur viðurskifti, ið kundi gerast betur uttan størri hóvasták, til dømis benkur við Boðanesheimið, fleiri busskýli og ljós við lendisgøtur.

Fundur lokin klokkan 14:30

Næsti fundur verður hósdagin 22. apríl klokkan 13 í Tilhaldinum. Sigi frá í góðari tið, um tað ikki liggur fyri at møta

Tórshavn 8. apríl 2021.

Petur Rouch
skrivari